Kunngerðablaðið A

2012 Hefti 34

ISSN 0907-905X

Nr. 101 15. oktober 2012

**Kunngerð
um
fyriskipanir í sambandi við jarðhitaskipan**

Við heimild í § 4, stk. 2 og 3, § 9, stk. 4, § 10, stk. 2, § 12, stk. 3 í løgtingslóg nr. 22 frá 16. mars 2012, verður ásett:

*Umsókn um loyvi og góðkenning av jarðhitaskipan*

**§ 1.** Tá søkt verður um loyvi at gera eina jarðhitaskipan, skal umsóknin vera skrivað á oyðublað, sum fæst frá kommununi. Umsóknin skal innihalda hesar upplýsingar um jarðhitaskipanina:
1) navn og bústað á góðkendum fysiskum ella løgfrøðiligum hitapumpuinstallatøri sbr. § 6, stk. 2,
2) slag av bygningi t.d. vinnubygningur, sethús, samkomuhús, skúli o.l,
3) bústað, postnummar og kommunu, har bygningur/ar er/u staðsettur/ir, somuleiðis navn á eigara,
4) upphitað vídd ($m^2$) á bygningi/ bygningum, orkutørvur á bygningi/bygningum (kWh/ár), effekttørvur (kW) og um upphitingarhátt, t.e. radiator, gólvhiti, heit luft, v.m.,
5) merki og modell av hitapumpu, hitapumpueffekt (kW) og slag og mongd av køliløgi í hitapumpuni, og
6) slag av hitasavningarslangu (kollektorslangu), ið er merki, modell og tjúkd.

*Stk. 2.* Umsóknini, undirskrivað av góðkendum hitapumpuinstallatøri skal sendast kommununi.

*Stk. 3.* Kommunan veitir loyvi at gera og nýta jarðhitaskipanir.

*Lodrætt jarðhitaskipan*

**§ 2.** Er talan um lodrætta jarðhitaskipan, skal umsóknin, umframt ásetingarnar í §1, stk. 1 innihalda hesar upplýsingar um brunnboraran og boriholið:
1) Navn og bústaður á fysiskum ella løgfrøðiligum brunnborara.
2) Krosstøl hjá orkubrunninum, sum er longdarstig, breiddarstig og hædd frá sjóvarmála.

*Stk. 2.* Tá kommunan hevur viðgjørt umsóknina, og henda er góðkend, fær umsøkjarin oyðubløðini aftur.

**§ 3.** Tá jarðhitaskipanin er klár at taka í nýtslu, skal brunnborarin senda viðkomandi kommunu oyðiblaðið sbrt. § 2, stk. 2, við teimum upplýsingum, sum eru nevndir í nr. 1-6 og sum brunnborarin hevur skrivað. Upplýsingarnar eru:
1) longd av stálrøri frá yvirflatu og niður á hellu,
2) samlað longd av boriholi og longd av aktivum boriholi,
3) grundvatnsstandur máldur í metrum undir yvirflatu,
4) longd av hitasavningarslangu,
5) lýsing av jarðslagi á ymsum dýpdum, og

6) vatnmongdum í litrum pr. tíma á ymsum dýpdum.

*Stk. 2.* Í jarðhitaskipanum við fleiri boriholum skulu upplýsingar sbrt. stk. 1 latast fyri hvørt borihol sær, og hartil skal samlaða longdin av innsamlingarslangum viðmerkjast.

*Vatnrætt jarðhitaskipan*

**§ 4.** Er talan um eina vatnrætta jarðhitaskipan, skal umsóknin, umframt ásetingarnar í § 1, stk. 1 hava hesar upplýsingar:

1) Hvussu langt undir yvirflatuni liggja slangurnar og hvussu langt er millum slangurnar.
2) Longd av hitasavningarslangu. Við jarðhitaskipanum við fleiri slangum skal samlaða longdin upplýsast.

*Stk. 2.* Slangurnar, nevndar í stk. 1, nr. 1, skulu liggja minst 50 cm undir yvirflatuni.

*Góðkenning av brunnborara*

**§ 5.** Arbeiðið hjá brunnborara umfatar sjálva boringina, ílegging av slangum, innføring í bygning, ífylling av boriløgi og trýstroynd av samlaðu skipanini. Hetta arbeiði kann bert gerast av góðkendum brunnborara.

*Stk. 2.* Fyri at verða góðkendur brunnborari krevst, at viðkomandi:

1) hevur verkligar royndir frá í minsta lagi 45 brunnboriarbeiðum seinastu 18 mánaðirnar, og
2) hevur tilsvarandi ástøðiligan og verkligan førleika, sum nevnt í nr. 1.

*Stk. 3.* Somuleiðis krevst, at umsøkjarin hevur:

1) skeið í sveising, t.e. sveising í stáli og sveising í PE rørum og PE trýstskipanum,
2) staðið prógv í serligum skeiði fyri brunnborarar í hydrogeologi, og
3) staðið prógv í serligum skeiði fyri brunnborarar viðvíkjandi arbeiði á ella við almennan veg.

*Stk. 4.* Brunnborari ella virki, sum útinnir arbeiði við brunnboring, skal hava trygging at svara fyri skaða av óhappum, ið kunnu henda 3. persóni, meðan arbeitt verður.

*Stk. 5.* Jarðfeingi góðkennir tann í stk. 2 nevnda brunnborara.

*Stk. 6.* Góðkenningin er galdandi í 3 ár, men kann endurnýggjast eftir umsókn.

*Góðkenning av installatøri*

**§ 6.** Arbeiðið hjá einum installatøri umfatar:

1) at gera eina meting av orku- og effekttørvi í bygningi,
2) at veita ráðgeving og at leggja ætlan fyri hitaskipan í bygningi,
3) at dimensionera borihol og hitapumpu, og

4) at knýta borihol, hitapumpu og hitaskipan saman í eina virkna eind.

*Stk. 2.* Fyri at verða góðkendur installatørur av jarðhitaskipanum krevst, at viðkomandi:

1) hevur útlærdan rørleggjara í arbeiði ella rørleggjara knýttan at virkinum við skrivligari avtalu,
2) hevur góðkendan elinstallatør í arbeiði ella góðkendan elinstallatør knýttan at virkinum við skrivligari avtalu,
3) hevur starvsfólk, sum hevur luttikið á skeiði um hitapumpu, sum verður sett upp,
4) hevur góðkendan køliteknikara í arbeiði ella góðkendan køliteknikara knýttan at virkinum við skrivligari avtalu,
5) hevur førleika at áseta orku og effekttørv á bygningum,
6) kann bjóða kundanum avtalu um viðlíkahald av hitaskipanini, sbr. eisini § 9 og § 10, og
7) ikki hevur boðað frá gjaldsteðgi, ella er undir trotabúarviðgerð.

*Stk. 3.* Installatørurin ella virkið sum útinnir arbeiðið, skal hava trygging at svara fyri skaða av óhappum, ið kunnu henda 3. persóni, meðan arbeitt verður.

*Stk. 4.* Góðkenningin er galdandi í 3 ár, men kann endurnýggjast eftir umsókn.

*Krøv til útbúnað*

**§ 7.** Krøv, sum verða sett til útbúnaðin, harundir til slangur og løg, sum verða nýtt í jarðhitaskipanini, eru:

1) Góðskukrav til plastikk, ið verður nýtt, er eftir svenska standardi SS-EN 12201 ella standardi, sum ikki er lægri enn hesin.
2) Hitasavningarløgurin (kollektorløgurin) skal vera 30% ethanol/vatn við denautureringsevni í.
3) Plastrørsamankomingarnar skulu sveisast við góðkendum tilfari og sveisiútgerð samsvarandi standardi EN 253.

*Krøv til jarðhitaskipanina*

**§ 8.** Áðrenn ein jarðhitaskipan verður tikin í nýtslu, skal ein roynd av tættleikanum í jarðhitaskipanini gerast. Royndartrýstið skal vera 1,5 ferðir tað trýstið, sum er á skipanini, tá rakstur er á hesi.

**§ 9.** Krøv til boring av holi til lodrætta jarðhitaskipan eru, at:

1) kompressari, borivognur og aðrar maskinur, sum verða brúktar til boriarbeiðið, skulu vera CE merktar,
2) súgvandi tilfar skal altíð vera tøkt á arbeiðsplássinum,
3) plássið, har boriholið er, skal merkjast við einum frámerki á húsagrundini ella á øðrum sjónligum staði, og
4) tilfar frá boringini skal burturbeinast á ein tryggan hátt, soleiðis at hetta ikki kemur út í nærumhvørvið, t.e. áir, løkir, kloakkir ella út í lendið.

*Eftirlit*

**§ 10.** Eftirlit á jarðhitaskipanina skal gerast einaferð um árið og umfatar:

1) eftirlit og áfylling av frystiløgi bæði í hitapumpu og hitasavnara,
2) máting av effektnýtslu fyri einstøku eindirnar,
3) eftirlit av rakstrartrýsti,
4) reinsan av tættara (kondensara),
5) royndir av trýsttrygdarskipanum, og
6) at allar neyðugar umvælingar verða gjørdar í sambandi við eftirlitið, og at ein lýsing av eftirkanningini verður skrásett í loggbók hjá brúkaranum.

*Gjøld*

**§ 11.** Kommunan kann áseta gjøld fyri veitan av loyvi sbrt. § 1, stk. 3. Jarðfeingi kann áseta gjøld fyri góðkenning av brunnborara sbrt. § 5, stk. 5 og fyri góðkenning av installatøri sbrt. § 6, stk. 4. Gjøldini mugu ikki vera hægri enn umsitingarkostnaðurin av tænastuni.

*Gildiskoma*

**§ 12.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Vinnumálaráðið, 15. oktober 2012

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Gunnleyg Árnafjall (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705